42 milliónir til vinnuframa

Føroyskar fyritøkur fara um stutta tíð at kunna søkja um stuðul úr einum nýggju vinnuframagrunni, sum hevur 42 milliónir krónur at býta út til fyritøkur við einum góðum hugskoti

Landssstýrismaðurin í vinnumálum ætlar nú at avtaka Ídnaðargrunnin og fýra aðrar grunnar og stovna ein Vinnuframagrunn við 42 milliónum krónum í staðin.

VINNUFRAMA-GRUNNUR

Nýggi vinnuframagrunnurin, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, ætlar er at seta á stovn, skal avloysa Ídnaðargrunnin, Menningargrunnin og tríggjar aðrar almennar grunnar. Pengarnir úr hesum grunnunum skulu flytast yvir í nýggja Vinnuframagrunnin, sum sostatt fær 42,5 milliónir krónur at arbeiða við.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur lagt uppskot fyri løgtingið um at stovna Vinnuframagrunnin og taka av fimm aðrar grunnar. Umframt Ídnaðargrunnin og Menningargrunnin er talan um Grunn Ferðavinnunar, Grunnin til ídnaðarfremjandi enamál og ábyrgdargrunnin.

Vinnuframagrunnurin skal stuðla tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan. Í lógini fyri grunnin stendur, at fyritøkur kunnu fáa stuðul til tiltøk, sum við framtíðini í huga betra um kappingarevnini ella økja um altjóðageringina hjá fyritøkunum.

Landsstýrismaðurin hevur eisini møguleika at gera av, at nøkur ávís øki eiga at verða stuðlaði. Talan kann millum annað gerast um bioteknologi, kunningatøkni og ferðavinnu. Virksemi í samband við oljuvinnuna verður eisini nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Grunnurin kann stuðla bæði vørum og tænastum, sum ein ein fyritøka ætlar sær undir, og grunnurin skal stuðla uppundir granskingar- og kanningarvirksemið í vinnufyritøkum.

Bjarni Djurholm heldur, at meira fæst fyri pengarnar, um ein grunnur kemur í staðin fyri teir fimm grunnarnar, sum ætlanin er at taka av. Og við at leggja pengarnar úr hinum fimm grunnunum yvir í nýggja grunnin, fæst eisini ein fíggjarliga sterkur grunnur.

Løgtingið skal viðgera uppskotið um Vinnuframagrunnin fríggjadagin.

Sambandsflokkurin vil privatisera SL og LV

Fáið uppgávurnar hjá Landsverkfrøðinginum og Strandferðsluni á privatar hendur. Hetta mælir Sambandsflokkurin til í einum uppskoti til samtyktar

Sambandsflokkurin mælir nú landsstýrinum til at privatisera og útlisitera so nógv av virkseminum hjá Landsverkfrøðinginum og Strandferðsluni sum gjørligt

ÚTLISITERING

Tað er ikki nóg mikið at fara undir at bjóða tænasturnar hjá Strandferðsluni til privatar at reka. Virksemið hjá Landsverkfrøðinginum skal eisini yvir á privatar hendur, heldur Sambandsflokkurin.

Flokkurin hevur lagt fram eitt uppskot til samtyktar, har hann heitir á landsstýrið um at syrgja fyri, at so nógv av virkseminum hjá hesum báðum stovnunum sum gjørligt verður privatiserað og útlisiterað til privat at røkja. Strandferðslan og Landsverkfrøðingurin skulu niðurleggjast, og ein deild undir Vinnumálastýrinum skal stovnast at hava um hendi privatiseringar og útlisiteringar av virkseminum hjá Strandferðsluni og Landsverkfrøðinginum.

Uppskotið hjá Sambandsflokkinum er lagt fyri løgtingið, eftir at Bjarni Djurholm hevur lagt fram eitt annað uppskot um at bjóða út tænastur hjá Strandferðsluni til privat at reka. Sambandsflokkurin heldur at virksemið hjá Landsverkfrøðinginum eisini skal takast við, nú ætlanin er at fara undir útlisiteringar og privatiseringar. Við uppskotinum sigur Sambandsflokkurin seg leggja upp til eina heildarloysn.

Sambandsflokkurin vil av við teir báðar stovnarnar, tí teir hava verið truplir at umsita, og sum flokkurin sigur í viðmerkinginum, hava teir mangan givið landsstýrismonnum og løgtingsmonnum grá hár í høvdið. Eisini hevur verandi skipan onkuntíð verið beinleiðis orsøkin til samgonguslit.

Sambandsflokkurin heldur harumframt, at tað er ov dýrt at hava tveir almennar stovnar sum Strandferðsluna og Landsverkfrøðingin.

– Flestu munnu ásanna, at skipanin hevur fingið loyvi at vaksa á ein hátt, sum ikki gevur borgarunum bestu og bíligastu tænasturna, sigur Sambandsflokkurin í viðmerkingunum.

Nevnd skal finna loysnina

Júst hvussu ein tílik privatiserings- og útlisiteringsætlan skal fremjast í verki, veit Sambandsflokkurin ikki nágreiniliga. Hann skjýtur tí upp, at ein skjóttarbeiðandi nevnd verður sett at gera eitt uppskot fyri teir báðar stovnarnar undir einum. Málsetningurin hjá nevndini skal vera at finna fram til eina loysn, sum gevur eina betri og bíligari tænastu, stendur í viðmerkingunum til uppskotið, sum kemur fyri í løgtinginum hesa vikuna.

Helena kann fáa dóm

Lógarbrotini hjá Helenu Dam á Neystabø í sambandi við pensjónsmálið vóru so mikið álvarslig, at tað kann koma upp á tal at revsa fyrrverandi landsstýriskvinnuna eftir revsilógini. Upprit løgfrøðingi hjá Fólkatingsins Umboðsmannastovni mælir løgmanni til at fara viðari við málinum

PENSJÓNSMÁLIÐ
John Johannessen

Anfinn Kallsberg, løgmaður, situr í hesum døgum og umhugsar, um pensjónsmálið skal fáa viðari fylgjur fyri Helenu Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýriskvinnu.

Niðurstøðan hjá løgdeildini um handfaringina av pensjónsmálinum hevur verið til viðgerar hjá løgfrøðingi, sum arbeiðir hjá Fólkatingsins Umboðsmannastovni. Hesin staðfestir frágreiðingina frá Løgdeildini og ræðir løgmanni til at fara víðari við málinum.

Sosialurin hevur fingið fatur á einum telefonuppriti, sum Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, hevur skrivað eftir telefonsamrøðu við Carsten Lojborg frá Fólkatingsins Umboðsmannastovni. Og harafturat hevur Sosialurin eisini fingið fatur á einum uppriti, sum løgmansstjórin skrivaði til løgmann, tá Helena Dam á Neystabø fekk møguleikan sjálv at siga seg úr landsstýrissessinum ella at verða koyrd úr honum.

Hesi skjøl mæla løgmanni til at tryggja sær, at ruddað verður upp í málinum og at umhugsa málið í sambandi við løgtingslógina um ábyrgd landsstýrissins.

Ruddað upp

Uppritið av telefonsamrøðuni millum Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóra, og C. Lojborg, frá Umboðsmannastovu Fólkatingsins sýnir, at C. Lojborg heldur tað vera sólarklárt, at viðkomandi landsstýrismaður átti at fara frá.

C. Lojborg vísir eisini á, at tað ikki er vist, at málið er liðugt, um landsstýrismaðurin fer frá. Hann ger vart við, at í Danmark hevði verið umhugsað, hví málið gekk so galið. Spurningar høvdu verið settir um, hvørt tað eru serligir trupulleikar í embætisverkinum, og myndugleikin hevði verið eftirhugdur so ella so.

Hetta arbeiðið er løgmaður farin í gongd við. Hann hevur álagt nýggja landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum at fáa viðurskiftini á Almanna- og Heilsumálastýrinum í rættlag og møguliga bera so í bandi, at lóggivið verður við afturvirkandi kraft.

Men løgmaður bíðar eisini eftir eini frágreiðing frá Landssgranskoðarnum um, hvussu nógvan pening Helena Dam á Neystabø í veruleikanum hevur goldið út uttan heimild.

Afturhelt upplýsingum

Tá landsstýrismálanevndin tók upp málið um embætisførsluna í pensjónsmálinum vóru nøkur innanhýsis skjøl í Almanna- og Heilsustýrinum, sum landsstýrismálanevndin ikki fekk fatur á, tí Helena Dam á Neystabø metti tey ikki vera neyðug at útflýggja.

Hetta heldur C. Lojborg eisini vera sera álvarsligt. Telefonuppritið sigur soleiðis:

»Tað er "meget åbenbart", at landsstýrismaðurin hevur afturhildið upplýsingar fyri tingsins nevnd. Hesi skjøl eru á ein hátt at meta sum kjarnin í málinum, og tað áliggur á ongan hátt landsstýrismanninum at meta um, hvørt hesi skjøl eru viðkomandi ella ikki.«

Sambært lógini um ábyrgd landsstýrisins er hetta revsivert.

Í stykki 2 í grein 5 í lógini um ábyrgd landsstýrisins stendur, at løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villeiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.

Upplýsingarnir, sum Helena Dam á Neystabø afturhelt, høvdu týdning fyri málið. Tí kann hon revsast eftir hesi grein.

Revsingin, sum er ásett í grein 6, er bót, hefti ella fongsul upp til 2 ár.

Løgmaður metir tó ikki, at neyðugt verður at fara í rættin við hesum. Men hann ger kortini greitt, at tað kann henda, tí hann ikki er liðugur at umhugsa málið.

– Tað er álvarsamt, at ein landsstýrismaður afturheldur upplýsingum. Men í hesum føri fekk eg fatur á upplýsingunum og lat landsstýrismálanevndini teir. Og niðurstøðan hjá landsstýrismálanevndini broyttist ikki, eftir at hon hevði fingið skjølini, sigur løgmaður.

– Men tað er heilt greitt, at tað er uppsagnargrund, at ein landsstýrismaður afturheldur upplýsingum, sigur Anfinn Kallsberg.

Spurningur um siðvenju

Kári á Rógvi, løgfrøðingur, er samdur við, at tað er nógv, sum talar fyri, at pensjónsmálið kann verða tikið upp í rættinum. Men hann staðfestir samstundis, at tað ikki er vanligt í londum, sum vit sammeta okkum við, at revsa landsstýrismenn, sum hava tikið politsku avleiðingarnar av sínum mistøkum.

– Fer ein landsstýrismaður, sum hevur forbrotið seg, úr starvi, er vanligt, at hann sleppur undan bæði revsiábyrgd og endurgjaldsábyrgd, sigur Kári á Rógvi.

– Í Føroyum hava vit enn onga siðvenju fyri, hvussu slík mál skulu avgreiðast. Tí er neyðugt, at politisku myndugleikarnir – og serliga løgtingið - stinga eina greiða linju út í kortið í hesum málinum. Ein slík linja kemur at verða vegleiðandi fyri onnur mál í framtíðini eisini, sigur Kári á Rógvi, løgfrøðingur.